

# Eitt dramatiskt lív fær enda

**Daniel J. Danielsen hevur havt eitt sera dramatiskt lív. Heilsan er farin, og nú nærkast endanum. Hann fer niður at fáa viðgerð í 1916. Hann klárar júst heim aftur, tá ið hann slóknar. Men søgan hjá honum livir. Vit prenta seinasta partin av frásøgnunum í bretska missiónsblaðnum Echoes of Service. Vit hava eisini onkrar myndir afturat úr Congo**



**Óli Jacobsen**
olij@sosialurin.fo

**8. partur**

## Fiskiveiða eftir menniskjum

*7. mai 1913*

Tað er gott at síggja, hvussu náttúran fer úr frystu vetrarkápuni og letur seg í aðra í grasgrønum summarlitum. Trø og blómur eru veruliga sjáldsom her. Men kunnu vit ikki "undrast yvir liljuna á markini" kunnu vit tó undrast á grasið og takka Gudi fyri, at hansara trúfesti aldri svíkur.

Fiskiveiðan er ikki so góð, sum hon hevur verið, men okkara Gud nýtir ymsar mátar fyri at mannabørnini skulu síggja teirra hjálparloysi, so tey kunnu venda sær til Hansara, sum hevur mátt at geva teimum fisk, og sum leingist eftir at bjarga sálum teirra.

Mangar dyr eru opnar fyri evangellinum. Biðið saman við okkum til náðiríka Faðir okkara um, at Hann má hjálpa okkum at nýta teir møguleikar, sum eru.

Í Tórshavn doypti eg 9. februar fýra trúgvandi og fýra afturat sunnudagin eftir. Summi av hesum hava verið umvend í longri tíð.

Seinnapartin í februar vóru vit á Viðareiði. Har er ein blómandi samkoma við um 25 fólkum, sum savnast um orð Guds. Vit høvdu møti hvørt kvøld í 10 dagar og gleddust um at síggja úrslit av evangeliinum. Trý trúgvandi vórðu doypt.

Fyrra partin í mars høvdu vit nøkur evangelisk møti í Sørvági. Síðan fóru vit við Smiril til Klaksvíkar. Vit høvdu evangelisk møti á páskum í bygdahúsunum, sum vit leigaðu. Her komu nógv og áhugin var stórur.

Okkara sangir vóru sungnir og murraðir á gøtum og í heimum. Eg ivist ikki í, at evangeliski boðskapurin, sum sáddur varð í mong hjørtu, fer at hava týdning fyri ævinleikan.

Eitt kvøld, vit vóru har, komu tvær sluppir av Viðareiði inn, og skipararnir komu á møti við manningunum. Ellivu vitnisburðir vóru frambornir tað kvøldi um frelsandi og varðveitandi megina hjá okkara Harra og Frelsara.

Hóast skipararnir ikki høvdu fingið nakra serliga fiskiveiðu, so eydnaðist hendan veiðan kortini væl. Fýra av manningini vórðu umvendir umborð á øðrum skipinum og tveir umborð á



*Hetta er ein av myndunum, sum vóru í Echoes of Service samband við greinirnar hjá Daniel. Myndin er pentað í 1905 og er frá stórhvalaveiðu*

hinum, síðani teir fóru út hendan túrin. Tað var rørandi at hoyra teirra erligu vitnisburðir, og nógv vórðu rørd til tár, tá ið hesir ungu fiskimenn søgdu frá, hvussu teir høvdu tikið í agnið á evangelliinum og vóru lendir trygt á klettinum. Gleðin og friðurin var teirra nú. Ja, mong sóu og skiltu, at tað er kraft í Kristi blóði.

Aftaná vóru vit nakrar dagar í Fuglafirði, har tað búgva tvær systrar og ein bróðir. Tann seinni er ein nýliga umvendur drykkjumaður. Biðið fyri teimum. Tey uppliva ikki smávegis av atsókn. Vit høvdu eitt stórt útimøti har og vitjaðu nøkur hús. Á vegnum aftur til Havnar vitjaðu vit í Søldafirði.

Eg eri fegin um at kunna siga, at kæri Mr. Sloan hevur eina hampiliga heilsu, og hann er ofta við á møtunum. Vit hava framúr útimøti í Havn beint nú.

## Eggjandi virksemi

*17. oktober 1913*

Sum eg skrivi er illveður, og húsini ristast. Sjógvurin, sum fyri løtu síðani var spegilsblankur, er nú í andarisi.

Tað kennist gott at vera í lívd, eins og vit hava eina signaða lívd í Krisusi. Nú er árliga fiskiveiðan av, og tað hevur gingist hampiliga væl.

Teir báðir brøðurnir, sum eg nevndi í seinasta brævi mínum, eru heima. Á túrinum hava fýra á øðrum skipinum vitnað um sína umvending, og á hinum eru tað ikki færri enn níggju, sum gleðast í frelsuni. Teir kunnu ikki tiga, men mugu fortelja øðrum um teirra nýfunna Frelsara. Hetta er sanniliga gott fiskarí. Prísa Gudi saman við okkum. Vit siga altíð teimum trúgvandi, at tey eru frelst til at verða menniskjafiskimenn.

Okkara summararbeiði í evangeliseringini hevur verið sera eggjandi. Í juni vóru vit her á leiðini i Havn, og tað vóru stór útimøti. Í juli vitjaðu vit Vág og Porkeri, har vit býttu út traktatir og hildu nøkur møti. Fólkið hevði tó nógv um at vera uttandura. Seinast í mánaðinum vóru vit á Viðareiði, har vit høvdu lívgandi møtir saman við teimum trúgvandi, og fýra vórðu doypt. Hetta vóru eini hjún og konurnar hjá tveimum brøðrum í samkomuni.

Í august fekk eg møguleika at fara ein túr í Sandoynna, har eg vitjaði fimm bygdir við evangeliinum. Í tveimum bygdum fekk eg dansistovuna til møtir, og her var fitt av fólki. Her var vístur stórur áhugi og fleiri ynsktu bibliur. Hesar havi eg altíð við mær. Síðan eg kom aftur, havi eg fingið signað brøv frá nøkrum persónum á Sandoynni. Eg vitjaði eisini Skúvoy, og fólk har bóðu okkum um at koma skjótt aftur.

Í september var eg aftur eina viku á Viðareiði, og haðani fór eg við maskinbáti til Kunoyar og Kalsoyar, har eg hevði góð møtir í roykstovum. Síðan fór eg umvegis Klaksvíkar til Fuglafjarðar, har eg hevði útimøti í átta kvøld, umframt at eg hevði heimamøtir fyri tey fáu trúgvandi har.

Tað hevur verið biðið nógv fyri einari gamlari konu, sum eigur tríggjar synir í samkomuni. Hon hevur funnið frið við Gud og játtar Kristus alment. Hon hevur verið ein stórur andstøðingur til sannleikan.

Presturin varð sendur at tosa



*Hendan myndin er av samkomuni í Hvalba. Í aftara rað síggjast f.v.:*
*Dánjal Poulsen, Elsba Frederikka, Elisabeth, giftist við Jákup í Skálavík, Johan, Jákup.*
*Fremra rað: Dánjal Johann Thomsen, Poulina, Kristina og Hans J. Mikkelsen, sum seinni giftiust og búðu í Havn.*
*Elsba Frederikka giftist við Hans Hendrik Hansen av Eiði. Tað var hjá teimum at Lina, kona Daniel J. Danielsen, búði, meðan maðurin var innlagdur í Keypmannahavn*